**SVIMJISAMBAND FØROYA**
Faroe Islands Swimming Association
Fédération des Îles Féroé de Natation

Limaskapur/Affiliation:
Ítróttasamband Føroya (ÍSF)
Norrøna Svimjisambandið (NSF)
Ligue Européenne de Natation (LEN)
Fédération Internationale de Natation (FINA)

# Úttøkuskipan til NMU 2022

Starvsnevnd SSF hevur samtykt fylgjandi kravtíðarskipan til Norðurlendsku Meistarstevnuna fyri Ung í svimjing 2020, sum verður í Tallinn í Estlandi hin 9. og 10. juli 2022.

Kravtíðirnar eru funnar við at rokna meðaltíð fyri veikastu heiðursmerkjatíð í viðkomandi grein á seinastu trimum EvropaMeistarastevnum á langgeil, og so leggja ein prosent-sats afturat. Veikasta heiðursmerki er vanliga bronsa, men kann vera silvur ella gull.

Prosent-satsurin til NMU eru í ár settur at vera +17% av hesum meðaltíðum frá EM.

Um tað vísir seg at vera færri enn 8 sum klára hesar kravtíðir, so kann hugsast at SSF tekur eyka svimjarar út, við støði í hvussu nógv FINA stig tey hava klárað í síni bestu grein, tó við einum minstamarki á 500 FINA stig

Norðurlendska svimjisambandið loyvir í mesta lagi 4 svimjarum av sama kyni úr sama landi at luttaka í somu grein, sum kann verða avmarkandi ifall at fleiri enn 4 klára kravtíð í somu grein.

Starvsnevndin tilskilar sær rætt at taka út eyka svimjarar til liðsvimjing.

Starvsnevndin tilskilar sær hartil rætt at meta um venjingarstøðið hjá viðkomandi svimjarum, út í frá úrslitum svomin síðani 1. januar 2022.

Kravtíðarskeiðið er frá og við 9. juli 2021 (FML 2021), til og við 6. juni 2022 (SuSvim Open 2022).

Árgangirnir eru sum tilskilaðir í yvirlitunum; gentur føddar 2007-2009 og dreingir føddir 2006-2008.

Sí annars “Reglugerð um úttøku og kravtíðir”:
http://www.ssf.fo/felagsskapur/reglugerd/reglugerd-um-uttoeku-og-kravtidir/

Feløgini verða biðin um at fráboða Svimjisambandinum um teir svimjarar ið hava klárað kravtíðirnar, við tilskilan av grein og tíð, umframt nær og hvar tíðin varð svomin.

Viðkomandi landslið verður úttikið sum skjótast aftaná at kravtíðarskeiðið er runnið.

Fyrivarni verður tikið fyri prentvillum.

Við svimjikvøðu

Starvsnevnd SSF

ATLANTIC AIRWAYS

# Kravtíðir til NMU 2022

At klára á langgeil

| Gentur f. 2007-2009 | Grein | Dreingir f. 2006-2008 |
|---|---|---|
| 00:28.47 | **50 frí** | 00:25.45 |
| 01:02.59 | **100 frí** | 00:56.29 |
| 02:16.38 | **200 frí** | 02:03.98 |
| 04:48.13 | **400 frí** | 04:24.96 |
| 09:51.61 | **800 frí** | - |
| - | **1500 frí** | 17:20.34 |
| 01:09.62 | **100 rygg** | 01:02.74 |
| 02:29.97 | **200 rygg** | 02:16.44 |
| 01:18.10 | **100 bringu** | 01:09.32 |
| 02:47.13 | **200 bringu** | 02:30.77 |
| 01:07.38 | **100 firvald** | 01:00.10 |
| 02:29.56 | **200 firvald** | 02:14.86 |
| 02:33.19 | **200 blandað** | 02:17.60 |
| 05:23.91 | **400 blandað** | 04:56.62 |

ATLANTIC AIRWAYS